


Løgreglumenninir:

# Arbeiða, tá hini hava frí

ÓLAVSØKAN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Vit hava altíð nógv at gera á Ólavsøku. Her kemur so nógv fólk til býin, at tað vildi verið løgið annað. Onkur er farin í feriu hjá okkum, men alt, sum ikki hevur feriu, arbeiðir á Ólavsøku, sigur vakthavandi. – Bygdapolitistar koma til Havnar at arbeiða tá og teir løgreglumenninir, sum arbeiða í dagtímunum vanligt, mugu eisini hjálpa til og taka nakrar tímar um næturnar, greiðir hann frá.

Hann sigur, at tað tó ikki er beinleiðis ófriður, sum er orsøkin til nógva arbeiði hjá løgregluni, men heldur fólk, sum hava fingið ov nógv av tí váta slagnum, og sum tí verða tikin inn á støðina at sova rúsin út.

– 27., tá tey ungu fara á konsert plagar tó at vera eitt sindur av ófriði. Tá verða vit ofta bidnir um at koma á staðið fleiri ferðir sama kvøld. Tað gongur ofta nakað harðligt fyri seg, og so ringja fólk eftir okkum. Burtursæð frá tí, er Ólavsøkan merkiliga friðarlig, tá ið hugsað verður um, hvussu nógv fólk eru savnað á so lítlum plássi.

Annars sigur hann, at teir eisini hava nógv at gera um morgnarnar, tá ið kommunumenninir rudda vegirnar. Tá plaga kommunumenninir at finna avdottin fólk allastaðni runt í býnum, sum teir kunna løgregluna um.

Hann sigur víðari, at í vanligum førum, tá ið fólk verða tikin inn at sova rúsin av sær, verða tey hildin inni, inntil tey eru púra edrú. Men á Ólavsøku er tað hopleyst. – Vit plaga at hava tey inni, inntil tey so nøkulunda fáa staðið á beinunum, so verða tey slept út aftur, fyri at geva pláss fyri tí næsta, sigur vakthavandi.

Løgreglan heldur eisini eyga við nógv sølubásunum. Teir skulu nevniliga hava eitt loyvi frá løgregluni og býráðnum, fyri at sleppa at selja. Er nakar, sum selur uttan at hava neyðuga loyvið, verður viðkomandi biðin um at pakka saman.

– Tað er annars hopleyst at siga, hvat fer at henda á òlavsøkuvaktunum. Tú kemur til arbeiðis, og ánar ikki hvørjar uppgávur, tú skalt loysa. Men man veit nøkulunda hvussu tað plagar at vera, so vit fyrireika okkum eftir førimuni. Men ólavsøkan verður drúgv í ár, tí vikuskifti kemur beint aftaná, so tað hava vit eisini fyrireika okkum til. Tað verður væl dekkað eisini, við nokk av fólki, sigur vakthavandi at enda.
















